ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 8. januar 2010

# Fult hondbóltsumfar

**Eftir at kvinnurnar eru tjóvstartaðar við tveimum dystum í vikuni, fer allur hondbólturin í gongd aftur sunnudagin, tá seks dystir eru á skránni í Sunset- og Atlantic Airways-kappingunum**




Hilmar Jan Hansen

Nú fyrsta fulla umfarið eftir jól og nýggjár verður spælt hjá kvinnunum, hava fýra av liðunum longu verið í gongd. Týskvøldið vann Stjørnan greitt á StÍF og mikukvøldið vann VÍF eitt sindur óvæntað á Neistanum. VB og Tjaldur spæla ikki sín dyst í tí umfarinum fyrr enn mitt í næsta mánaði.

Í vikuni hevur nógv fokus verið á dystinum millum Tjaldur og Stjørnuna, sum Tjaldri vildi hava fluttan. Í skrivandi løtu bendir tó alt á, at dysturin verður sunnudagin, sum upprunaliga ætlað. Síðstu tríggjar ferðirnar, liðini hava spælt, hevur Stjørnan vunnið, og nú Tjaldur ikki hevur allar spælararnar tøkar, er Stjørnan favorittur at vinna fjórðu ferð við.

Á heimavølli skal Neistin royna at reisa seg ímóti VB, ið vil hava stig, so liðið ikki dettur ov langt aftur um VÍF, sum á útivølli skal royna seg ímóti StÍF, ið somuleiðis vil vísa, at liðið er betur enn avsmurningurin ímóti Stjørnuni.

## Neistin fer avstað

Hjá monnunum koyrir Neistin avstað við fullari ferð, og hóast tað eru føroyameistararnir, ið vitja hesa ferð, eru teir bláu enn eina ferð favorittar. Liðini møttust eisini í hálvfinalunum í steypakappingini, og tá vann Neistin so nógv í heimadystinum, at ikki var neyðugt at skræða seg sundur uppi í Hoyvík, tá H71 vann.

Á Skála tekur StÍF ímóti VÍF, og her stendur eitt sindur upp á spæl, tí nú eru vestmenningar bara tvey stig aftan fyri strandingar. Í Kollafirði møtast KÍF og Kyndil, og her spyrst, um Kyndil skal takast í álvara sum finalubiðil, ella um KÍF enn eina ferð ger okkurt óvæntað.



**Tjaldur-Stjørnan Stjørnan hevur vunnið tríggjar ferðir á rað, og móti einum skerdum Tjaldurs-liði eru tær favorittar til dystin, sum hóast alt rokið verður spældur sunnudagin**

# TB skal verja finalustøðuna

**Tvøråkvinnur skulu í Eik-liguni hjá kvinnum royna at verja annaðplássið, tá tær í morgin fara til Klaksvíkar. Sunnudagin verður grannauppgerð í Vágum millum SÍ og Drátt, og tá verður eisini gamli mansklassikarin millum Fleyr og Mjølnir**




Hilmar Jan Hansen

Kvinnukappingin sær út til at gera alsamt meira spennandi, og nú trý umfør eru eftir, áðrenn stigini verða býtt í helvt, royna serliga tey næstfremstu at staðfesta sína støðu, so tey fáa sum mest við sær.

Eitt sindur óvæntað eru tað kvinnurnar hjá TB, ið liggja á øðrum plássi, men tó við sama stigatali sum Mjølnir og Fleyr, og tvey stig framman fyri Drátt. TB skal á útivølli møta Mjølnir, ið óivað vil gera alt fyri at vinna annaðplássið aftur, so nú sleppur TB veruliga at standa sína roynd.

Hóast oddaliðið SÍ er heili seks stig framman fyri tey næstu, er lítið at ivast í, at dysturin ímóti Drátti sunnudagin fer at hava alt tað, sum ein sonn Vágaupgerð skal hava – ikki minst, nú Dráttur tykist hava tikið seg væl fram í síðstuni.

Triði kvinnudysturin verður millum botnliðini bæði sunnudagin, tá ÍF á Kambsdali tekur ímóti KÍF. Vinnur ÍF, sleppur liðið fýra stig frá unga KÍF-liðnum, sum enn einki stig hevur vunnið.

## Mansklassikari

Í Eik-liguni hjá monnum er bara ein dystur um vikuskiftið, men afturfyri er talan um ein gamlan klassikara í føroyskum mansflogbólti. Hann verður sunnudagin í Havn, tá Fleyr tekur ímóti Mjølnir.

Hjá monnunum eru stigini longu býtt í helvt, og her ræður um hjá Fleyr at gera ein vørr, skal Mjølnir ikki beinanvegin stinga av frá hinum liðunum. Mjølnir er undan dystinum trý stig framman fyri SÍ og Fleyr, sum kappast um at møta klaksvíkingunum í FM-finalunum.

Hin dysturin hetta umfarið verður ikki fyrr enn mikukvøldið, tá SÍ í Sørvági tekur ímóti ÍF.

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 10/01 | 14.30 | StÍF-VÍF |
| 10/01 | 14.30 | Neistin-VB |
| 10/01 | 15.00 | Tjaldur-Stjørnan |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 10/01 | 16.00 | StÍF-VÍF |
| 10/01 | 16.00 | KÍF-Kyndil |
| 10/01 | 16.00 | Neistin-H71 |

### Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 09/01 | 12.30 | Mjølnir-TB |
| 10/01 | 14.00 | ÍF-KÍF |
| 10/01 | 15.00 | SÍ-Dráttur |

**Eik-ligan, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 10/01 | 15.00 | Fleyr-Mjølnir |